# Kjak



Palli Dalsgaard

## Stjórnarskipan á triðja sinni

Hesaferð er tað Javnaðarflokkurin, ið hevur tikið sær av stjórnarskipanini, at fáa hana gjøgnumførda, so skil fæst á millum Danmark og Føroyar. Fólk standa spyrjandi, hvussu hava vit klárað okkum hesi mongu ár, tá hendan skipan er so átrokandi, sum tað ljóðar. Her hevur Javnaðarflokkurin mistikið seg, tí hetta er eitt mál, sum hoyrir Tjóðveldi til og ikki Javnaðarflokkinum.

Sum tað ljóðar, skal hendan skipan vera so góð og tað er hon vist eisini í eygunum á teimum loysingarsinnaðu, tí hon sær út til at vera byrjanin til endan. Tað kann lætt henda, at danir verða troyttir av okkara politikarum og kvetta á stokkinum, so tað verður Danmark, ið loysir frá Føroyum og ikki umvent. Og hvat so? Tað er lætt skiljandi, at veljarar eru farnir at ræðast og serliga av tí eldra endanum.



Oddmar á Steig

## Viðmerkingar til Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu!

*Helena D. á Neystabø hevur í bløðunum lagt fram sínar »visiónir« og ætlanir um kristindóm sundirvísingina í fólkaskúlanum í framtíðini*

Eg kenni – og aðrir kristnilærarar – alt aftur frá donsku skrivingini í m.a. Folkeskolen í 1960-70. Øll kristniundirvísingin skal »neutraliserast« so nógv sum gjørtligt – og lærarar skulu í eini so týðandi lærugrein niðurraðfestast, sjálvt um boðini Jesus gav, ljóðaðu: »Farið tí og gerið øll fólkasløgini til lærusveinar mínar, við tað at tit doypa til navn Faðirsins og Sonarins og Heilaga Anada við tað, at tit læra tey at halda alt tað, ið eg havi boðið tykkum. Og sí, eg eri við tykkum allar dagar, alt til veraldar enda«.

Europa er meir og minni ein avkristnaður heimspartur í dag. Kristindómurin fekk í síni tíð so mangt at blóma – men nú gongur niður á »bakka«, síðani humanisman og materialisman hava tikið valdið. Søgan sigur okkum, at øll heimsveldi, t.d. Babyloniska ríkið og Rómverska ríkið gingu til grundar vegna ringan moral – rotinskapur innanífrá: Náttarlevnað, vællevnað, drykkiskapur, hor, morð osfr. Tað sær út sum vit læra einki av søguni, sjálvt um hvørt skúlabarn veit um støðuna í Sodoma og Gomorra – og seinni í Herkulanum og Pompeii í Italia ella í okkara tíð New Orleans í USA, ið Obama forseta ætlar at byggja uppaftur. Er tað rætt?

Góða Helena! Tú spælir við »eld«.

Bið heldur um Heilaga Andans leiðslu, áðrenn tú villleiðir alt fólkið. Danmark er avgjørt ikki nakað gott fyridømi, tá ið tað viðvíkur kristindómsundirvísing.

**E.S.** Eg vil ráða tær til at lesa Nýggja Testamenti sera gjølla, áðrenn tú setir nakra nevnd. Kristindómur er radikalur boðskapur!



Edmund Joensen
*løgtings- og fólkatingsmaður*

## Føroyar eiga at heiðra Ulrike Steuerwald

*Skrivstovan hjá Edmundi Joensen, løgtings- og fólkatingsmanni, sendir við hesum út soljóðandi opna bræv:*

Opið bræv til Føroya løgmann um at skipa fyri, at almennu Føroyar veita Ulrike Steuerwald, barnalækna, viðurkenning og hóskandi heiður fyri slóðbrótandi arbeiðið sítt í Føroyum innan genetiskar sjúkur.

**Kaj Leo Holm Johannesen, løgmaður**

Undirritaði heitir við hesum á tygum um, sum skjótast, at taka stig til, at týski barnalæknin, Ulrike Steuerwald, fær eina almenna føroyska viðurkenning og heiður fyri sítt slóðbrótandi arbeiði innan genetiskar sjúkur í Føroyum.

Flestir føroyingar munnu vita, hvussu týðandi arbeiðið hjá Ulrike Steuerwald er fyri tey, sum stríðast við Carnitine Transporter Deficiency, stytt CTD. Tað er ikki ov nógv sagt, at týski barnalæknin hevur bjargað føroyskum mannalívum.

Millum læknar í Føroyum tykist semja vera um, at Ulrike Steuerwald hevur avrikað nakað heilt serligt í arbeiði sínum innan genetiskar sjúkur. Herfyri skrivaði Knud Jacobsen, kommunulækni á Eiði, m.a. soleiðis í brævi til undirritaða:

"Fá fólk hava havt so stóran týdning fyri heilsustøðuna sum Ulrike við sínari uppdaging av genetiskum sjúkum her í oyggjunum. Hennara eldhugur, íðni og menniskjaligheit bera í sær, at rættiliga nógv fólk standa í beinleiðis takksemisskuld til hennara".

Semja man vera í Føroyum um, at Eiðislækni hevur grein í sínum máli.

Einstaklingar hava ivaleyst takkað Ulrike Steuerwald fyri týðandi arbeiðið við CTD, men tað er hóskandi, at almennu Føroyar viðurkenna hennara stóra týdning fyri landsins heilsustøðu og veita henni samsvarandi heiður.

Avrit av hesum brævi er sent landsstýrismanninum í heilsumálum.



Sólvit Simonsen

## Aftur nú?

Ein samrøða millum tveir sandoyingar.

- Hevur tú hoyrt? Teistin siglir ikki vegna tekniskar trupuleikar, hvør siglir so fyri hann?
- Ongin, vit eru bara sandoyingar, góðin.
- Hvussu so við sjúkraflutningi?
- Nei, góðin. Vit mugu bara halda okkum undir dýnuni tí tyrlan er til eftirlit.
- Og ger Løgtingið onki við hettar?
- Nei, góðin. Teir stríðast við at slíta høvdið av hvørjum øðrum.
- Ja, men er ikki ein samgonga?
- Nei, góðin. Teir stríðast við at halda høvdið fast á kroppinum, tí annars verða teir ikki valdir aftur á Ting og tað er ein ordans smeitur, tí teir hava eitt gott arbeiði....

Soleiðis er tað, góðin.